## Takklaði bóltin í mál frá miðjuni

Sebastian Langkamp, sum spælir fyri týska felagið Karlsruhe, skoraði eitt óvanligt mál um vikuskiftið. Hann gjørdi eina glíðandi takkling á miðvøllinum, og onkursvegna fleyg bólturin avstað ímóti málinum hjá Leverkusen og endaði í netmeskunum. Hetta var einasta málið, sum kom í dystinum, so tað var vorðið sum sigursmál.



## Laudrup vil ikki tosa um landslið

Eftir at Michael Laudrup fekk sekkin sum venjari í russiska felagnum Spartak Moskva, hava danskir miðlar hug at spyrja hann, um hann vil verða venjari hjá danska landsliðnum eftir Morten Olsen, men tað vil Laudrup als ikki tosa um. - Tað er ein óneyðugur spurningur í løtuni. Tað er ópassandi at tosa um tað, nú tað gongur so væl hjá landsliðnum, sigur Michael Laudrup, sum áður hevur verið hjálparvenjari hjá Morten Olsen á danska landsliðnum.

07 Vestur-B36 4-2 (2-2)

# Skrivaðu søgu í Sørvági

**Fyri fyrstu ferð nakrantíð megnaði 07 Vestur at vinna í landskappingini, tá ið botnliðið higartil gjørdi av við odda-liðið**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

*07 Vestur*

*B36*

At bólturin framvegis er rundur, og at einki er avgjørt fyrrenn alt er avgjørt og meiri av tí slagnum varð rudduliga undirstrikað, tá ið 07 Vestur í gjár setti trý stig inn á kontina, sum eftir trý tey fyrstu umførini var skralltóm. 07 Vestur er spildurnýtt í fremstu deildini, og tí var hetta fyrsti sigurin nakrantíð hjá nýggja vágaliðnum í bestu deildini.

Sigurin var sjálvandi kærkomin, og hann var eisini eyðsýndur, tí hann varð vunnin á B36, sum undan 4. umfari var einasta liðið við fullari úrtøku. Hegga Samuelsen hevði ábyrgdina á 07 Vestur beinkinum. Piotr Krakowski er í Póllandi, og tað vóru vorðin sum tíðindi, hann hoyrdi klokkan 5 ígjár!

Hesa ferð bar ikki til hjá árstalsfelagnum, sum longu í 1. hálvleiki noyddist at skifta vongverjan í høgru, Magnus Olsen, út, og sum hevði skadda Jákup á Borg á beinkinum, inntil tað restaði eitt korter. Tá ið landsliðsspælarin varð settur á vøllin, var støðan 2-2, og tað kundi verið líkt til, at Mikkjal Thomassen ætlaði at vinna øll stigini. Soleiðis tørnaði tað tó ikki út.



*So glapp hjá 07 Vestur, sum sunnudagin fekk sín fyrsta í Vodafone-deildini. Og tað gjørdi ikki dagin verri, at mótstøðuliðið var higartil ósigraða B36*

Heimaliðið hevði alla tíðina verið væl upplagt og ágrýtið, og tí var einki forgjørt í, at tað fall 07 Vesturi til fyrimunar. Seinastu tíggju minuttirnar skoraði superveteranurin Jens Erik Rasmussen tvey mál. Tað fyrra við frísparki, sum úr høgru sigldi millum nógvar og framvið Tróndi Vatnhamar í B36 málinum, og tað seinni við brotssparki, tá ið vanliga leiktíðin var farin.

Ransin Djurhuus hevði havt gula kortið sjey ferðir á lofti, tá ið hann bríkslaði fyri síðstu ferð, og rómurin í 07 Vestur leguni var stórur. Hugburðurin hevði verið fínur, og tað hevði víst seg at loysa seg at vinna nærdystirnar og vera fyrstur á returbóltunum.

Høgri vongverjin, Ragnar Niclasen, sá longu í 9. minutti gult, og miðskeiðis í 1. hálvleiki varð hann útskiftur – ivaleyst tí venjarin kalkuleraði við møguleikanum fyri einum gulum korti afturat.

### Tað er hugaligt har vesturi

0 stig vestur hevur tað seinastu vikurnar fleiri ferðir verið tikið til. Nú er henda vendingin søga, og sjálvandi fegnast teir har vesturi um, at teir ímóti B36 prógvaðu fyri sær sjálvum og øllum øðrum, at tað ber til:

- Hugburðurin var fínur, og tað kennist hugaligt, at vit nú eru komnir á talvuna, staðfesti Jens Erik Rasmussen, sum síðstu løtuna skoraði tvey mál.

Hann rósti sínum liðfeløgum fyri avrikið:

- Vit eiga fleiri ungar spælarar, ið vístu, at tað er dugur í teimum. Tað var serliga týdningarmikið, tí longu í 1. hálvleiki noyddist ein av teimum eldru, Rúni Nolsøe, skaddur av vøllinum. Hann er ætlaður at vera ein av teimum, sum stuðlar teimum yngru, men hesir vístu, at teir vóru førir fyri at stríðast og spæla fyri sigrinum, og tað gevur góðar vónir, nú vit skulu spæla á Argjum. Tað verður ein ógvuliga spennandi avbjóðing.

**-jh**

### Mugu vera eyðmjúkir

Mikkjal Thomassen var sjálvandi ikki nøgdur, eftir at hann fyri fyrstu ferð sum B36 venjari hevði verið eygnavitni til, at liðið hjá honum hevði tapt ein landskappingardyst.

Men hjá venjaranum kendist tað ikki sum um, at fótbóltsheimurin var farin um koll orsaka av tapinum:

- Vit eru ovurfegnir um stigini, sum vit hava vunnið. Felagið hevur valt at byggja upp á ungar spælarar, og tað stuðli eg leiðsluni í. Vit hava mist fleiri landsliðsspælarar, og í staðin hava vit fingið ungar spælarar á liðið. Tað fer ivaleyst at síggjast aftur í misjøvnum avrikum, og tað mugu vit læra av. B36 hevur áður havt trupulleikar í Sørvági, og nú mugu vit vísa eyðmýkt fyri næstu uppgávuni. Eisini hon verður ivaleysa stór, tí nú skulu vit spæla ímóti HB!

**-jh**

Heimaliðið slerdi tónan ann beinanvegin. Tór-Ingar Akselsen breyt ígjøgnum í vinstru og legði innfyri, og miðvallarin í høgru Hans Arni Ellefsen stýrdi bóltin í málið.

Tá ið góður hálvur tími var farin, tóktist tað skula vera sum vanligt, tí eftir lítlari løtu skoraði B36 tvær ferðir: Í fyrra førinum var Sam Malson púra leysur, tá ið hann skoraði eftir fríspæling frá Brima Koroma, og í seinna førinum átti Brima Koroma aftur sín stóra leiklut. Trygvi Askham hálvbjargaði skotroynd frá honum, og innskifti Johan Ellingsgaard var fyrstur á returbóltinum.

Undan steðginum javnaði 07 Vestur, og tað var ógvuliga týdningarmikið. Málskjútti var Milan Pejcic, sum við nærra stólpa stútaði í málið eftir hornasparksinnlegg úr høgru.

Í 2. hálvleiki var tað Tór-Ingar Akselsen, ið var millum mest eyðsýndu heimamenninar, sum vann frísparkið, sum bar leiðslumálið við sær, og tá ið B36 hevði spent bogan í royndat at koma aftur í aftur, og 07 Vestur vann brotsspark, var tað, eftir at Hendrik Rubeksen varð feldur.

Eftir lúsingin í Gøtu fótaði 07 Vestur sær, og í árstalsfelagnum í høvuðsstaðnum fingu teir enn eina ferð staðfest, at Sørvágur er torførur skansi at vinna á.